| Gerðabók býráðsins Eykabýráðsfundur | |
|---|---|
| Fundardagur: | 07. august 2015 |
| Býráðsfundur nr. | 10/2015 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Árant Berjastein |
| | |

Ár 2015 tann 07. august kl.16.00 varð 4. eykabýráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 01. august 2015 um innkalling til fundar.

**Møtt:**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Harley Joensen
Árant Berjastein
Sigga Ó. Joensen
Sonni á Horni
Bjørghild Arnholdsdóttir

Árant Berjastein, skrivari

Bjørghild Arnholdsdóttir møtti sum varalimur fyri Petur Abrahamsen, sum hevur boðað frá at hann ikki kann møta og Harley Joensen møtti sum varalimur fyri Eyðun á Lakjuni, sum hevur boðað frá at hann ikki kann møta. Magnus Midjord er burturstaddur vegna uttanlandaferð.

**Mál nr. 42/2015, jnr.15/00213**
**Mál viðvíkjandi endaligt byggjiloyvi til tunnlar omanfyri Havsbrún.**

Havsbrún arbeiðir við ætlan at gera mjølgoymslutunnlar inn í bergið omanfyri Havsbrún.

Vinnunevndin mælir til at Havsbrún fær loyvi at gjøgnumføra verkætlanina.

**Avgerð:**
Málið hevur verið til 4. viðgerð á býráðsfundi tann 07. august 2015, og varð einmælt samtykt við 8 atkvøðum fyri.

**Mál nr. 43/2015, jnr.15/00213**
**Mál viðvíkjandi sølu av tunnil 2 og 4 og miðgongini.**

Tekniska nevndin hevur havt fund, tann 28-07-2015.
Tekniska nevndin mælir býráðnum til at lýsa tunnil 2 og 4 og miðgongd til sølu sambært, kunngerð nr. 122 frá 22.12.2000.

Somuleiðis hevur Vinnunevndin havt fund tann 28-07-2015.

Vinnunevndin mælir býráðnum til at lýsa tunnil 2 og 4 og miðgongina til sølu sambært, kunngerð nr. 122 frá 22.12.2000.

Eitt broytingaruppskot frá borgarstjóranum Sonna á Horni er dagfest tann 07-08-2015. Undirritaði hevur í uppskotið at Advokatskrivstovan tekur sær av søluni av tunnil 2 og 4 og miðgongini.
Sølan av tunnlunum skal liggja so tætt uppat útveðanarvirðinum sum gjørligt og ikki undir 20 mill krónur.
Øll innkomin boð skulu leggjast fyri býráðið til støðutakan.

**Avgerð:**
Málið hevur verið til 4. viðgerð á býráðsfundi tann 07. august 2015. Fyrst var atkvøtt um broytingaruppskotið hjá Sonna á Horni borgarstjóara. Har vóru 4 atkvøður fyri: Árant Berjastein, Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen og Bjørghild Arnholdsdóttir og 4 atkvøður ímóti: Sigurð S. Simonsen, Jann Toftegaard, Dánjal Vang og Harley Joensen.
Broytingaruppskotið er sostatt fallið.

Síðani var atkvøtt um uppskotið hjá Teknisku nevndini og Vinnunevndini. Har vóru 4 atkvøður fyri: Sigurð S. Simonsen, Jann Togtegaard, Dánjal Vang og Harley Joensen og 4. atkvøður ímóti: Árant Berjastein, Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen og Bjørghild Arnholdsdóttir.
Uppskotið er sostatt fallið.

Bókin lisin.

Fundurin lokin kl. 16.35.

Sigurð S. Simonsen

Dánjal Vang

Harley Joensen

Bjørghild Arnholdsdóttir

Sigga Ó. Joensen

Sonni á Horni

Jann Toftegaard

Árant Berjastein

Árant Berjastein, skrivari.